# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Meiri kunnning frá tí almenna!

Summarið fer at halla og sum vanligt hava vitjaninar verið bæði nógvar og ivaleyst strævnar fyri landsins kosnu menn og kvinnur og teirra embætisfólk. Tað er einki at ivast í, at allar hesar vitjanir av sendinevndum hava stóran týdning fyri sambond okkara úteftir. Norðurlendskir politikkarar og embætisfólk hava sjálvsagt tørv á at kunna seg um føroysk viðurskifti, og okkara fólk hevur tørv á at fáa kontaktir og at greiða frá okkara sjónarmiðum. Hetta er alt bæði gott og væl.

Hinvegin er tað eitt, sum eyðkennir hesar mongu vitjanir, sum ikki er so gott, og tað er, at føroyski almenningurin ikki verður nóg væl kunnaður um hesar vitjanir og endamálið við teimum. Tað kemur sjáldan fyri, at gestir og vertir halda tíðindafund tíansheldur tíðindaskriv verða send út. Hetta er bæði óprofessionelt og løgið. Ein skuldi trúð, at so mætir gestir sum útlendskir parlamentarikarar og ráðharrar høvdu áhuga í at hitt føroysku pressuna. Føroyski almenninguirn hevur í minsta lagi áhuga í at fáa at vita, hvat teirra skattapeningur fer til. Hesar vitjanir kosta pengar og skulu tær gagna øðrum enn ferðaskrivstovum og matstovum, so eigur at verða nógva betur kunnað enn higartil, og pressan eigur at fáa høvi at hitta útlendsku gestirnar, soleiðis at hon kann varpa út til almenningin, hvat tað eru fyri fólk, sum vitja, hvat hesi hava uppá hjartað og hvat hesi ikki minst kunnu tilføra tí almenna orðaskiftinum. Sum dømi kann nevnast, at Mentanarnevnd Fólkatingsins júst hevur verið á vitjan. Eingin kunning og eingir pressufundir.

Vit liva í altjóðagjørdum heimi, har netverkini eru ein berandi táttur í øllum altjóða samstarvi. Tað er tí ein skylda hjá landsins myndugleikum at tryggja føroyskum vinnulívi og felgasskapum bestu fortreytir fyri netverksbygging. Ein liður í hesi strategi má vera, at almenningurin veður kunnaður um, hvør, ið kemur higar á almenna vitjan. Besta kunningartólið er pressan. Hetta tól verður alt ov lítið brúkt. Visti ein ikki betur, so kundi ein hildið, at landsins myndugleikar als ikki vistu, at her í Føroyum er ein vælvirkandi pressa, sum hevur bæði hug og rætt til at verða kunnað fyri síðani at bera hesa kunning víðari til almenningin. Her hava landsins myndugleikar enn nógv at læra. Her ikki minst løgting og landsstýri.

**Sosialurin**

## Handfaring av nøkrum orðum

**JOHN S. MYLLHAMAR**



Hugtakið ”ungdómar” gevur verkir í oyruni. Tá ið eg hoyri orðið dómar, rennur mær løgfrøði, úrskurður í rættarmáli, í huga. Ungdómur er partur av mannalívinum, sum vanliga verður býtt upp í fýra bólkar: barndómur, ungdómur, manndómur, aldurdómur. Ein ungdómur, sagt um ungan drong ella unga gentu, ella tveir ungdómar, sagt um tvey ung fólk, tykist margháttligt, tá ið hugsað verður um tað, ið nevnt er omanfyri. Man nakar siga: tveir barndómar spældu í ánni, ella tveir aldurdómar fóru eftir vegnum? Nei, tveir óvitar ella tvey børn spældu í ánni, tvey gomul fólk fóru eftir vegnum. Nakrir ungdómar í Havn hava gjørt herverk. Nakrir aldurdómar í Klaksvík hava verið útferð. Vit hava hópin av orðum at brúka ístaðin fyri ungdómar, so sum ungfólk, ung, unglingar. tey ungu, ungur drongur, ung genta. Skal orðið ”dómar/ur” verðar brúkt um tey ungu, so má tað náttúrliga eisini kunna brúkast um hinar aldursbólkarnar - allar ella ongan.

Annars, so trúgva fólk bara meira og meira. Eingin hugsar tað, ella heldur tað, longur. Eldri fólk, eg minnist, søgdu altíð: eg hugsi tað. Ein vøkur útsøgn. Eg haldi tað, hevur verið vanligt á mannamunni. Men nú hoyrir tú nærum í hvørjum setningi: eg trúgvi tí! eg trúgvi tað! eg trúgvi at ...! jeg tror det! Enntá var tað onkur, sum helt fyri: Eg trúgvi at eg fari at ferðast í summar. Orðið trúgva hevur heilt aðra merking. Vit trúgva á Guð, Allah, Buddha ella hvønn tað nú er; og vit trúgva einum menniskja, at tað tosar satt. Málkøn hava ofta gjørt vart við hesa málspillu.

Í nánd er tíðin, at menn fara eftir havhestaungum/nátaungum. Ein blandingur tykist vera komin í orðini ungar og pisur. Nakrir fuglar hava pisur, aðrir ungar. Vanligt er at siga, at lomvigin, ternan, lundin og aðrir fuglar við, hava pisur. Skaldið yrkir um ternubøguna: ”hon átti smáar pisur tvær”. Havhestur, høna, dunna, gás og aðrir fuglar, hava ungar.

Lundaungi og dunnupisa? Nei, ikki so vanligt - enn.

Nú gryvja er grivin millum ættarliðini, og barndómar og ungdómar lítið og einki eru saman við manndómum og aldurdómum og hoyra tey snakka og siga frá, verður málið eisini meira og meira vanskeplað. Skjótt er at venja fólk, serliga nú útvarpsstøðir senda alt samdøgrið, tí har er málburðurin í talu og sangi mangan sum best ber til.

## Skrásett paralag í hesi tingsetu?

**ALFRED OLSEN**
løgtingsmaður



Í desember 2006 samtykti Løgtingið broytingina í grein 266b í revsilógini, at nú skuldi “seksuelle orientering” koma at standa í lógini, og so var hildið, at nú var tað gjørt sum skuldi gerast á tí økinum. Friður kom at valda viðv. teimum samkyndu til komandi val, men eg vísti á, at hetta bert var byrjanin, tí eftirfylgjandi kom kravið frá teimum samkyndu at vera skrásett paralag (hjúnalag), adoptión, eftirgjørdur gitnaður v.m. sum vildi enda í kirkjuligari vígslu.

Í dag mugu vit ásanna, at soleiðis bleiv, og kravið um hjúnalag og adoptión er reist av teimum samkyndu í Havn í dag, og hesi hava eisini fingið lyfti frá politiskari síðu, um at skrásett paralag, (hjúnalag) av samkyndum, eigur at vera sett í gildi í Føroyum, í dag heldur enn í morgin.

Hetta er støðan, og eg ivist í, um Finnur Helmsdal undir núverandi umstøðum, vil drála við at leggja uppskotið um skrásett paralag fyri tingið, til eftir komandi løgtingsval. Tí kunnu vit vænta, at hann kemur at leggja uppskot um skrásett paralag fram í hesi tingsetuni.

**Avkristnan**
Eg víst á, at samtykta broytingin í gr. 266b fór av føra til eina avkristnan av Føroyum, og hesum kom eg ikki at taka undir við undir nøkrum umstøðum. Eg boðaði tí frá, at eg tók meg úr samgonguni, har tær 10 av 17 atkvøðunum ið samtyktu uppskotið, komu frá. Tá roknaði eg við, at tað komu at ganga eini 15 ár, áðrenn vit komu at uppliva kravið um vígslu, men við hesi gongdini, sum vit síggja í dag, so kemur tað at henda skjótari, um ikki nakað veruligt hendir hjá okkum, sum vilja varðveita Føroyar sum ein kristin tjóð.

**Kristni grundvøllurin**
Eg vil vera trúgvur móti tí føroyska samfelagnum, ið byggir á tann kristna grundvøllin, Jesus Kristus, haðan signing hevur floymt í ríkiligt mát, bæði til land og fólk í øldir, og tí vil eg heita á allar føroyingar, um í hesum tíðum at standa fastir á okkara kristna grundvølli.

**Mín støða**
Eg vil ikki vera við til at samtykkja lógir, sum ganga ímóti boðum og ásetingini í tí kristnu siðalæruni, sum millum annað broytingin í gr. 266b viðførir, men vil, nú eg eri settur á Føroya Løgting, eisini virka fyri at verja tað Føroyska samfelagið móti avkristnani.

Eg veit hvat tað kostar, men skulu Føroyar vera millum bestu lond í heiminum at liva í, ja vera eitt “paradís” á jørð, so er alneyðugt, at Gud, sum er skaparin av paradís, fyllir alt í øllum.

Eg tók ikki undir við broytingini í grein 266b og komi heldur ikki at taka undir við teimum lógaruppskotum sum henda broytingin kemur at hava við sær.

Hetta er fyri tað fyrsta grunda á mína persónligu sannføring og fyri tað næsta grunda á § 1 í stevnuskránni hjá Sambandsflokkinum, sum sigur: at Sambandsflokkurin vil á øllum økjum reka ein framtakshugaðan politikk á kristiligum mentanargrundarlagið.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.